# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar



*6. oktober fekk Beinir, sum er 3 ár, hendan fitta lítlabeiggjan. Hann var 53 cm og vigaði 3800 g. Foreldur eru Gisleyg & Jóannes, og vit búgva í Vanløse.*



*28. november varð hendan vakra, lítla diddan borin í heim á Hvidovre Sjúkrahúsi. Hon vigaði 3404 gram og var 53 cm long. Hon eitur Laura og foreldur hennara eru Eyðstein úr Miðvági og Eyðbjørg Leo Simonsen úr Havn.*

19. november 2004 fingu Charlotte og Magnus Mikkelsen, búsett í Århus, ein son

20. november fingu Armgarð og Ansgar Sørensen, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4130 gr.

22. november fingu Maria og Hjaltur Poulsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4500 gr.

24. november fingu Marjun Hansen og Høgni S. Justesen, Kaldbak, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3600 gr.

26. november fingu Zia og Hanus á Krákusteini, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3750 gr.

26. november fingu Anni Mia og Christian Djurhuus, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3660 gr.

27. november fingu Rini og Sámal Sivertsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3850 gr.

28. november fingu Majbritt og Birgir Christiansen, Haldórsvík, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4150 gr.

29. november fingu Valborg Simonsen og Oystein Sørensen, Keypmannahavn ein son. Hann vigaði 3900 gr og var 58 cm langur.

30. november fingu Turið og Hans David Durhuus, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4025 gr.

30. november fiingu Randarsól Mohr og Jan Simonsen, Tórshavn, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4950 gr.

# Hansa og Benni gullbrúdleyp



Í dag halda Hansa og Benjamin Joensen í Klaksvík teirra gullbrúdleypsdag.

Hansa er dóttur Rikku og Victor Danielsen, trúboðara í Fuglafirði.

Benjamin (Benni) er sonur Malvinu og Jákup Joensen, bónda í Gerðum í Klaksvík.

Tey eiga fýra børn, Rúnu, Gudny, Victoriu og sonin Jákup.

At skriva nøkur orð, um hesi bæði sermerktu hjún, er ikki so lætt.

At lýsa Hansu við orðum á pappíri ber, fyri meg, slættis ikki til, hon má upplivast.

So, støkk inn á gólvið. Verð saman við henni. Gev tær tol, og tú finnur eina gløgga kvinnu við stórari vitan.

Hon trúttar og trýstir einki oman yvir teg. Henni nýtist ikki at veipa við ørmunum, fyri at staðfesta tað, hon vil bera fram, sum veruleika. Hon hevur prógvini.

Fá hana at breiða nakað av tí, hon úr hondum sínum og programeraðu bindi- og seymimaskinun sínum hevur virkað, út á borðið, og tú undrast.

Og fyri ikka at tala um, tá hon sigur ger so væl, tað er borðreitt. At matgera er hon framúrskarandi.

Aftaná, at børnini vóru blivin vaksin, fór hon at nema sær kunnleika í roknskapi og bókhaldi. Fekk fult stigatal í bókhaldi og góðan karakter í roknskapi. Hon hevði bert sín barnaskúla lærdóm at dúva uppá. Tað sigur ikki so lítið.

Nøkur ár arbeiddi hon á roknskaparvirkið. Frá ungum av var hetta dreymur hennara, og henni untist at arbeiða við hesum nøkur ár, og dámdi tað sera væl og var nógv avhildin.

Spyr hana um ætt sína. Fær í Bíbliuna við henni, sum var umsett til føroyskt í barnaheimi hennara. Spyr hana um ymisku familjurnar í Klaksvík, tær eldru í hvussu er og nógvar av teim ungu við.

Spyr hana um alt. Hon fylgir ómetaliga væl við.

Sum kona ein mann, ið alt sítt langa lív hevur verið sjómaður og er tað fyri so vítt enn, hevur tað ikki altíð verið lætt. Men sterka álit á tann Harra, hon frá barni av setti sítt álit á, hevur verið ein barlast sum hevur borið uppi í ringum, eins væl í góðum døgum.

Benna má onkur søguskrivari taka sær av.

Ein av skipsmonnum hansara segði við meg:

"Benni er ikki hvør sum helst. Eg veit ikki, hvat eg skal siga um hann, hann er nakað heilt sjáldsamt.

Tað er ein myndugleiki yvir honum, sum setur ein í respekt og allíkavæl í arbeiðinum sum javnlíka. Sum skipari er hann avgjørdur um, at tað hann hevur í ætlan er tað rætta, men skuldi tað víst seg, at hann kanska tók feil, er hann ikki bangin fyri at viðganga tað. Ikki bangin fyri at taka hond í, um hann kom niður á dekkið. Ein stórur maður í mínum eygum".

Eini 44 ár hevur hann verið í tænastu hjá P/f. J.F.Kjølbro. Meginpartin sum skipari. Hevur verið skipari á nógvum av teirra trolarum. Var stjóri á „Kósaskip" hjá P/f. J.F. Kjølbro.

Ein av álitismonnunum hjá Kjølbro segði fyri mær, at Benni var sera góður at samarbeiða við. Bæði táið farast skuldi og tá landað varð. Hann goymdi einki undir ermuni, sum ikki toldi dagsins ljós.

Umframt mangt annað, Benni hevur fingist við, hevur hann eisini verið í tænastu hjá Olaf Nielsen, reiðara. Verið skipari á trolarunum " Saida" sum var "Nónhamar" og "Naumov" sum var "Skálaberg" við russiskari og føroyskari manning. Vit høvdu eitt sera gott samarbeiði í fýra ár, sigur Olaf.

Benni kom væl útav tí við russararnar og hevur vinir millum teirra, og onkur teirra hevur verið á vitjan. Hann lærdi onkran av teimum at syngja føroyskar sálmar.

Tá Olaf segði russarnum frá, hvør bleiv skipari og aldurin á honum, hildu teir hann vera púra øran at senda ein "olding" yvir til teirra sum skipara. - - Eg bað teir bíða eftir úrslitinum, og teir vóru ikki sviknir, sigur Olaf.

Andaligu støðu Bennasa er øllum kunnugt, og tað sum nakað serligt, tá á døgum. Hann var bert 9 ár tá hann fór til ein av teimum elstu í Betesda og ynksti at verða doyptur. Hetta var óvanligt tá á døgum at so ung vóru doypt. Aftaná skilagott at hava greitt sína støðu sambært skriftina fyri teimum, var eingin ivi hjá teim elstu, Benni skuldi verða doyptur.

Hann hevur ikki verið maður við mongum orðum á pallinum, har hann sjáldan hevur staðið. Men skilagott, við fáum orðum, hevur hann vitnað og havt eina áminning til samkomuna.

Umborð á skipunum hevur eingin ivi stungið seg upp um, hvør andaliga støða hansara er. Hann hevur eisini lagað tað so, at møtir hava verið hildin umborð

Benni og Hansa! Hjartaliga til lukku, og havið ein góðan dag saman við familjuni, samverkafólki og vinum.

## 25 ára starvsdagur



Ann Mohr, klinikkgenta, hevði 3. desember 25-ára starvsdag hjá Tannlæknastovuni í Fuglafirði.

Hini starvsfólkini vilja á henda hátt senda henni eina heilsu og ynskja henni tillukku við degnum. Samstundis vilja vit takka henni fyri fyrimyndarliga gott samstarv øll hesi árini.

Ann er gift við Pól Jákup Mohr, sum arbeiðir á deildini hjá Sparikassanum við Streymin.

Ann og Pól Jákup eiga tveir synir; Petur, sum er 15 ár og Pól, sum er 10 ár.

Teir tríggir fáa eisini eina heilsu frá okkum – og tillukku við mammuni!

**Brynhild Maria,
Marjun og Steintór**